


***Nr. 15*** ***26. juli 2015*** ***75. árg.***

# O, kristni tú alt

*Hevði tú tó eisini vitað, enntá á hesum degi tínum, hvat ið er tær at friði.*

*Luk. 19,42.*

“O, kristni tú alt
á foldum oss veitir, tað eygum er fjalt,”

syngja vit. Men hvat er tað, sum er fjalt fyri eygunum?

Heimurin veit ikki, hvat ið signing er. Hann hevur ikki hóming av, hvat virði er goymt í orðunum: **Harrin vælsigni teg og varðveiti teg**. Heimurin roknar bara við tí, sum tú kanst nema við og máta, og sum vitið kann góðtaka. Signing er eitt fremmant orð í heiminum. Men tann, sum trýr á Gud, veit eitt sindur um tað.

“Ongin signing er við hasum,” søgdu tey gomlu, “tað veruliga manglar.” Fimm breyð og nakrir smáfiskar kunnu verða til signingar, um teir verða lagdir í røttu hendurnar, og tú kanst verða vælsignaður, um tú leggur teg í Guds hendur.

Heimurin veit ikki, hvat tað merkir, at **Harrin letur andlit sítt lýsa yvir okkum og verður okkum náðigur**. Hetta eru gátufør orð, sum onki virði er í, siga summi. Og tó er tað satt, at bara í trúnni á Guds fyrigeving kann eitt menniskja anda frítt. At Gud er mildur móti okkum, og hvønn morgun kemur okkum á møti við miskunn síni, sær heimurin onki í. Men tann, sum tekur við dóminum yvir lív sítt, flýggjar inn í Guds fyrigeving og sigur takk, tí at miskunn Guds er ikki uppi.

Heimurin veit ikki, hvat liggur fjalt í orðunum: **Harrin lyfti ásjón sína yvir teg og gevi tær frið**. Heimurin roknar ikki við Guds anda og heldur, at friður er nakað, ein sjálvur kann skaffa við

at liva nøkulunda heiðurliga. Men tað ber ikki til. Fyrigeving og friður hoyra saman, og hjartað finnur ikki frið, fyrr enn menniskjað er flutt inn í tað, sum vit hava fingið frá Gudi við Jesusi Kristi. Hann eina ræður yvir friði okkara.

Hevði tú tó eisini vitað, enntá á hesum degi tínum, hvat ið er tær at friði. Veitst tú tað? Og ert tú sinnaður at innrætta teg samsvarandi tí, sum tú veitst?

*Ja, vilt tú navn títt, Gud mín, skriva*
*í mína sál, tín ognarlut,*
*tá veit eg væl, at tað skal liva*
*um aldur og ei strikast út.*

# At liva

Yrkjarin Robert Louis Stevenson lá til tað seinasta, hann var sjúkur, og honum longdist eftir at sleppa inn til tað æviga lívið. Ein prestur segði seg vera  sinnaðan at koma at tosa við henda kenda yrkjaran, sum var "í vanda fyri at doyggja," sum hann orðaði seg. Stevenson svaraði, at hann við gleði vildi taka ímóti honum sum ein, ið "var í vanda fyri at liva."

Hann visti óivað, at tað hvørki er vandamikið at doyggja ella at liva, um ein velur at lurta eftir Jesusi og skipa lív sítt eftir honum. Tí at annaðhvørt vit liva ella doyggja, hoyra vit Harranum til.

Bíblian sigur: "Tann, ið lýðir á meg, man búgva í trygdum, man liva í friði uttan at óttast fyri illum." (Orðt. 1,33).

# Guds langmóð

"Vanvirðir tú ... góðsku hansara og tolmóð og langmóð?" Róm. 2,4. Gud er ógvuliga tolin og langmóðigur; men tað er eitt mark. Onkur hevur sammett Guds langmóð við eitt elastikk. Hann toyggir og toyggir elastikkið út, tí hann vil ikki, at nakar skal glatast. Men at enda brestur elastikkið, og tá eru menniskju farin út um markið, t.d. Judas og menniskjuni á Nóa døgum. 1. Pæt. 3,20.

e.c. ums.

# Harranum lovið

Fyri mongum árum síðani verður sagt frá einum gomlum, vøkrum siði, sum hirðarnir í fjallalendinum við Savoya og Piemont høvdu. Tá ið sólin var næstan sett í dalinum, meðan teir seinastu sólargeislarnir gyltu teir kavaklæddu fjallatindarnar, tók hirðin, sum átti smáttu á hægsta fjallatindi, hornið og rópaði sum ígjøgnum eitt talurør:

"Harranum lovið!"

Hirðarnir, sum áttu smáttu har í grannalagnum, fóru eisini út um sólsetur. Fyrsta, teir hoyrdu rópið, tóku teir tað uppaftur á sama hátt, og so barst aftur úr fjalli í fjall, úr dali í dal:

"Harranum lovið!"

Tá ið hornið var tagnað, kom ein hátíðarlig kvirra – tá fullu hirðarnir á knæ, tóku húgvuna av høvdinum og hildu bøn.

Tá ið teir seinastu sólargeislarnir vóru burtur, og myrkrið seig niður á fjall og dal, tóku teir aftur hornið og rópaðu einaferð afturat:

"Harranum lovið!"

So fóru teir inn aftur í tær einsligu smátturnar og løgdu seg í friði og náðum at hvíla eftir ein langan og stravnan dag.

Soleiðis lovaðu hirðarnir Harranum. Henda lítla søgan talar við okkum og minnir okkum á, at eisini vit skulu lova Harranum.

Vit hava øll almikið at takka og lova Harranum fyri. Latið okkum eisini minnast hini vøkru orðini hjá sálmaskaldinum: "Sál mín Harranum lova, og alt, sum mær er í, heilaga navni hans. Sál mín Harranum lova, og gloym ikki allar vælgerðir hans." (Sálmur 103,1-2).

*t.* týddi.

# Kærleikin

Á føroyskum hava vit bara eitt orð fyri kærleika. Í Bíbliuni eru á grikskum trý ymisk orð fyri kærleika:

1. Eros. Orðið "erotikkur" kemur av hesum orðinum. Hetta er holdligur kærleiki millum mann og konu.
2. Filos. Hetta er kærleiki millum vinir, í familjuni og millum menniskju annars. Filantropi er í ætt við hetta orðið, og filantropi merkir mannakærleiki, vælgerð.
3. Agape. Hetta er Guds kærleiki til okkara, hóast okkara syndir.

e.c. ums.

# Gev tær far um, hvar ið tú stendur

*”... Kristus hevur borið fram eittans offur fyri syndir ... med alla ...”*
*Hebr. 10,12.*

Gev tær far um, hvussu Gud handfór syndina í Gamla Testamenti. Presturin tók eitt lamb, smurdi blóðið á altarið og ofraði tað. Tá ið offurroykurin steig upp í loft, stroyddi hann øskuna niður í túnið og steig upp á hana. Í tí løtuni var bøtt fyri syndina hjá tí seka persóninum og skuldin tikin frá honum. Sum hetta er ein vøkur mynd upp á okkara frelsu!

Á Golgata varð vreiði Guds í fullum máti oyst út yvir Kristus. Har var hann bæði tín høvuðsprestur og títt offurlamb, tá ið hann rópti: ”Tað er fullgjørt!” Jóh. 19,30. Í tí løtu var goldið fyri syndir okkara frá vøggu til grøv. Í tí løtu, tú trýrt á Jesus sum tín Frelsara, stendur tú framman fyri altarinum og ert ”fríkendur”. 2. Kor. 5,21.

Tá ið fyrstu niðursetumenninir í Amerika koyrdu tvørtur um grasfløturnar, var størsta ræðsla teirra, at eldur skuldi koma í alt hetta grasið. Eldur kundi festa í av tí heitu sólini, og eftir ongari tíð kundi tú verða umgyrdur av eldslogum. Men hin skilagóði oddamaðurin fyri øllum preriuvognunum gav beinanvegin øllum boð um at fara aftur til eitt stað, har eldur hevði verið í fyrr. Hví? Tí har var einki, sum eldurin kundi festa í!

Charles Wesley skrivaði: ”Gud vil ikki krevja gjald tvær ferðir, fyrst frá mínum bløðandi staðgongumanni og so frá mær.” Jesus rindaði prísin fyri okkum øll. ”Hann bar sjálvur syndir okkara á likami sínum upp á træið…” 1. Pæt. 2,24. Tí kanst tú, um Djevulin plágar teg við øllum tínum mistøkum og ósigrum, við frímóði siga: ”Eg eri avgjørt ikki fullkomin; men eg eri frelstur og elskaður, og Gud góðkennir meg!”

”… et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




***Nr. 16*** ***9. august 2015*** ***75. árg.***

# Kærleikin er lívsins kelda

*Fjarlagið er tað, sum til er, og so dúpt so djúpt; hvør kann finna tað?*

*Præd. 7,24.*

Hvat vita vit, tá ið saman um kemur? Spurningarnir hópa seg upp, og hvør kann geva nøktandi svar? Ongin! Er nakað samband millum skuld og lagnu og millum býtið av gleði og sorg, tað ónda, lívsins uppruna og samanhang og deyðans gátu – hvør dugir at svara? Tað hendir langt burturi, so djúpt so djúpt.

Men so vísiliga er tað skipað, at ikki er neyðugt at fáa allar hesar spurningar svaraðar. Tað er við hesum eins og við so mongum løgnum spurningum, sum eisini smábørn kunna seta. Aftur og aftur má svarið vera: “Tað dugi eg ikki at forklára tær.”

Fjarlagið er tað, sum til er og so djúpt so djúpt. Men ein spurning **mugu** vit fáa svaraðan. Treytin, fyri at álitið skal halda, er, at hesin spurningur er og verður **spurningur nummar eitt: Hvat skal eg gera fyri at verða frelstur?**

Bíblian umrøður hetta! Hon hevur ikki svar til allar teir spurningar, sum vit kunna finna uppá at seta. So leingi vit eru áhugað í øllum møguligum øðrum, verða vit send burtur við tómum hondum. Men um grundina undir øllum lærir Bíblian: **Í fyrstuni skapaði Gud himmalin og jørðina**. Og um frelsuvegin sigur hon: **Trúgv á Harran Jesus, og tá skalt tú verða frelstur**.

Menniskju leita og søkja í gomlum bókum, tað verður granskað og grundað, og tað gevur stór úrslit, “men fjarlagið er tað, sum til er og so djúpt so djúpt.” Gud hevur givið eitt svar, men svarið vilja menniskju ikki góðtaka. Gud hevur sagt tað loysandi orðið og hevur latið okkum vitað, at kærleikin er

lívsins kelda, og frelsan verður givin einum og hvørjum, sum trýr. Hetta er tað í evangeliinum, sum fólk taka sær meinboga av, men orðini verða standandi, og sælur er tann, sum í teimum finnur grundvøllin undir øllum.

*Eg veit, hvar góð er grundin,*
*eg veit, hvar ljós er lon,*
*tá verøldin fer sundur*
*og fúnar øll í fon.*
*Eg veit, hvat ei kann vikna,*
*hvat aldri vikast vil,*
*tá vísmenn allir blikna,*
*ei vita veg og skil.*

# Troystin

Okkurt av tí, sum mest plágar eitt kristið menniskja her á fold, er, at alt umskiftist og broytist. Viðhvørt kenna vit á okkum, at Jesus er so nær, og so viðhvørt tykist hann at vera so langt burturi. Eina løtu kunnu vit frøa okkum um fullgjørdu frelsu hansara, og so aftur tykist alt so tómt og turt. Viðhvørt síggja vit klárliga tað, sum vit eiga í Jesusi. Og so aftur viðhvørt er alt so døkt og kolgrátt.

Og soleiðis má vera, alt meðan vit eru her á fold. Natúra okkara tolir ikki, at lívið skal vera øðrvísi. Hevði altíð verið sólskin, so hevði eisini alt verið skróturt. Og hevði altíð regnað, so hevði herviligur vatnfloymur herjað okkum.

Rosenius sigur einastaðni:

“Tá ið eg eri uppi á Taborfjalli, og alt er klárt og ljóst, tá kemur óttin á meg, tí at tá veit eg, at nú ber oman aftur í dalin og myrkrið. Men tá ið eg eri niðri í dalinum og myrkrinum, tá fari eg at takka Gudi, tí at tá veit eg, at nú ber niðan aftur á Tabors sólgylta tind.”

Tað er bara so syrgiligt, at vit líkjast hini gomlu konuni, sum sá eitt tok fyri fyrstu ferð í lívinum. Tá ið hon sá hesar stóru, tungu vognarnar standa á jarnbreytunum, risti hon við høvdinum og segði: “Á, nei, hetta fáa teir ongantíð at ganga!” Men so fór tokið, og ferðin gjørdist størri. Tá sló hin gamla hendurnar saman og rópaði: “Nei, hetta steðgar ikki aftur!”

Soleiðis eru eisini vit. Er myrkt og mjørkadøkt, so suffa vit og gremja okkum: “Nei, Gud er farin frá mær. Alt er vónleyst!”

Men tá ið vit taka evangeliið at okkum og sanna, at Jesus er hjá okkum av nýggjum, tá er vent í holuni. Tá siga vit næstan sum hin gamla konan, sum sat og lýddi á evangeliið um tað, sum hon átti í Jesusi. Og so breyt smílið sær slóð gjøgnum tárini, og hon rópaði: "Á, nei, eg skuldi fingið stundir at skrivað hetta niður, so at eg ongantíð aftur skal koma illa fyri!"

Á, ja, hon mundi mangar ferðir aftur koma illa fyri.

Men einaferð er onki umskiftiligt og broytiligt longur. Tá ið Jesus kemur aftur! O, signaða troyst! Tá skulu vit altíð vera saman við Harranum. O, tann dagur, tá ið eg skoði Frelsara mín handan stjørnuhiminsins skreyt, har eg síggi hann andlit til andlits í kongsskrúð!

*t.* týddi.

# Frumgróðurin

Týski ríkiskanslarin Otto von Bismarck skal hava sagt: "Uttan vón um eitt ævigt lív er tað ikki eingang stríðið vert at lata seg í um morgunin." Hvat er lívið uttan eina vón? Tá ið tú hevur livað eina tíð, sært tú, hvussu skjótt dagarnir líða. Bíblian líknar lívið við eina blómu, sum eitt stutt skifti stendur so undurføgur, men sum síðani ølnar og verður virðisleys.

Hvør er grundin undir vónini um eitt lív eftir hetta? Kristindómurin svarar: Tann veruleikin, at Jesus reis upp frá deyðum. Hann er vorðin fyrsti, nýggi gróðurin - frumgróður, sum Bíblian orðar seg. Eftir hann fer nýggja lívið at rísa upp úr køldu moldini til ein ófatiligan vakurleika. Paulus ápostul skrivar: *"Er tað bert í hesum lívi, at vit hava sett vón okkara til Krists, tá eru vit tey syndarligastu av øllum menniskjum. Men nú er Kristus risin upp frá deyðum sum frumgróðurin av teimum, sum sovnað eru burtur."* (1.Kor,15,19-20).

## SOS Familjan

Barty Shokralla er leiðari fyri Miracle Channel, sjónvarpsrásina hjá Arili Edvardsen. Hann fer nú undir at framleiða eina nýggja sendirøð, sum kallast "SOS Familjan"! Her vil hann vísa, hvat ið kann henda, tá ið vit loyva Jesusi at koma framat í hjúnalagnum og í familjuni, hvussu sár og sambond kunnu lekjast, og hvussu ónd ting kunnu broytast. Sovoðið hendir, tá ið Jesus byggir húsið.

*e.c.* ums.

# Eitt trygt akkerspláss

Vit tosa um, at okkurt er so trygt sum eitt akker. Men tey, sum hava roynt at fortoya ein bát, vita, at tað bæði kann eydnast og miseydnast. Kastar tú dreggið, har sum tað er djúpt, er fortoyningin ov stutt, og dreggið verður ikki fast í botn. Og kemur dreggið niður, har haldbotnur ikki er, fer báturin at dríva.

Bíblian talar um eitt trygt festi fyri vónina, sum er eins og akker sálarinnar, ið hevur trygga akkersgrund í æviga heiminum, har Jesus Kristus hevur alt valdið og vil draga øll børn síni heim hagar. Guds orð sigur: "Vit hava vónina eins og akker sálarinnar, sum er trygt og fast og fer allan vegin inn um forhangið." (Hebr. 6,19).

*Jesu dýrabara navn,*
*okkum frælsis morgunroði,*
*Himni frá við gleðiboði,*
*bangnum sálum hvíldarhavn,*
*trúnni sterka sigursmerki,*
*vónum trygga akkersgrund,*
*lýs tú leið í lívsins verki,*
*veit tú lív á deyðans stund.*

---

Hygg eftir teimum islamisku symbolunum - hálvmánin á teirra moskeum og flaggið við einum sniði sum hornini á tarvi! Er hetta Baal, tarvagudurin í Gamla Testamenti? Og tá ið tú samanbert hetta við myndamálið í Opinberingini 17, tarvurin, ið neyðtekur Evropa, so er ódjórið/tarvurin eyðkendur av hornum sínum.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74